## DAGSINS MEINING

# Varðin má lagast úr neðra

Tað er av alstórum týdningi, at raðfestingin ikki verður gloymd. Vit hava júst skorið 366 milliónir um árið av blokkstuðulinum, og tí er ikki nógv at taka av. Skúlaverkið má deilast uppí tað, sum er neyðugt, og so alt tað, sum kann verða gott at hava. Eingin ivi eigur at vera um, at tað sum er neyðugt má koma fyrst í raðnum, tá peningur og annað tilfeingi skal býtast av landsins leiðslu.

Fólkaskúlin er fundamentið, og má tí má hann hava tey best møguligu korini. Uttan ein góðan fólkaskúla, er einki at byggja víðari uppá. Tá grundstøðið verður lagt við einum góðum fólkaskúla, so er umráðandi, at miðnámsskúlar og skúlar, ið útbúgva fólk til arbeiðsmarknaðin, hava góðar teytir at virka undir. Fróðskaparsetur og hægri lestrarstøð eru eisini av týdningi, men fortreytin má vera eitt gott grundfesti í einum góðum fólkaskúla og góðum miðnámsskúlum. Varðin má lagast úr neðra.

Tað vilja altið verða skúlar, ið kunnu vera góðir at hava, men alt til sína tíð. Kunnu vit veruliga bert sita og hyggja at, meðan eitt nú Tekniski Skúli í Havn hevur húsast eina fjórðingsøld í barakkum, meðan man avsetur milliónir til nýggj projekt, ið helst hoyra heima eitt vet longri niðri í raðfestingini?

Eiga vit ikki at fáa tað at rigga, sum er, áðrenn vit tynna uppaftur meira út við nýggjum skúlum?

Tað er ivaleyst uppá sítt pláss, uppá sikt, at byggja ein listaskúla, men týdningarmikið er at gera sær greitt, hvar hesin skúli passar inn í samlaðu raðfestingina. Vit hoyra dag og dagliga um, hvussu nógv væntar í til at halda fólkaskúlalógina. Vit síggja, at høli mangla til Fiskivinnuskúlan í Vestmanna, at Tekniski Skúlin í Havn heldur til í barakkum og at Føroya Studentaskúli og HF-Skeið halda til í gomlum niðurslitnum hølum. Stutt sagt, so er nógv at tríva í hjá landsins skúlamyndugleikum, og tí eigur onkur at seta spurningin hví ein samlað raðfestingarætlan ikki verður gjørd fyri allan útbúgvingarsektorin í Føroyum til politiskt og alment kjak.

Tað ber illa til at diskutera ein skúla sum eitt einkultstandandi projekt uttan samstundis at hyggja at samlaða tørvinum innan føroyska útbúgvingarverkið. Eitt dámligt tiltak sum Listaskúlin eigur ivaleyst sítt pláss í hesari raðfesting, men hann má ikki diskuterast sum eitt einkultstandandi projekt, uttan atlit til, hvussu nógv er í stóra potti til aðrar hart tiltrongdar ábøtur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Opin fyrispurningur í samband við, at farast skal undir at byggja Tekniska Skúlan í Tórshavn

**Vegna stýrið fyri Tekniska Skúlan í Tórshavn**
*Tummas H. Sørensen, form.*



Av tí at samsvar ikki er millum samgonguskjalið 2002-2006 og skriv, sum skúlin hevur fingið frá landsstýrismanninum í Mentamálum, verður fylgjandi fyrispurningur settur:

Fyrispurningurin er til Anfinn Kallsberg, løgmann, Høgna Hoydal, landsstýrismann, Kára P. Højgaard, tingmann og Jenis av Rana, tingmann.

Hvussu tulka tit fylgjandi brotúr Samgonguskjalinum 2002-2006, undirskrivað tann 6. juni 2002 av tykkum, umboðandi viðkomandi flokkar. Sitat úr samgonguskjalinum: **»Nýggjur tekniskur skúli og studentaskúli verða bygdir í Tórshavn«.**

Upplýsast kann, at Tekniski Skúlin í Tórshavn, í skrivi dagf. 4. november 2002 frá landsstýrismanninum í Mentamálum, hevur fingið boð um, at Tekniski Skúlin í Tórshavn verður liðugt bygdur í 2012.

# Er skatturin ov høgur ?

**Bárður Nielsen**
*løgtingsmaður*



Ofta verður víst á, at skatturin í Føroyum er alt ov høgur, og at fólk ikki hava hug at forvinna sær nakrar krónur eyka, tí at alt fer í skatti, og tað er eisini rætt, um hugt verður eftir okkara progressivu skattaskipan við marginalskatti. Marginalskatturin er tann skattur, ið verður goldin av tí seinast vunnu krónuni, og tí er tað honum, lønmóttakarin hyggur eftir, tá ið hann skal taka støðu til, um hann skal arbeiða eitt sindur eyka.

Og býrt tú í eini kommunu við einum skattaprosenti uppá 23, er tað nokk vert at meta um, um tað loysir seg at forvinna nakrar krónur eyka, tí um vit hyggja eftir niðanfyristandandi talvu, síggja vit, at um løntakarin forvinnur kr. 200.000 sammett við kr.190.000, hevur hann bert kr. 3.770 til sín sjálvs, restin kr. 6.230 fer til skatt og onnur avgjøld.

| | | | Munur |
|---|---|---|---|
| **Inntøka** | **190.000** | **200.000** | **10.000** |
| Landskattur | 36.820 | 40.520 | 3.700 |
| Kommunuskattur | 38.870 | 41.170 | 2.300 |
| Kirkjuskattur | 570 | 600 | 30 |
| Als vm. | 3.800 | 4.000 | 200 |
| - | **80.060** | **86.290** | **6.230** |

Hetta er sjálvandi drepandi fyri arbeiðshugin hjá fólki. Tí er tað umráðandi, at vit fáa eina skipan, ið heldur eggjar fólki til at arbeiða eitt sindur eyka, serliga í hesum góðu tíðum, nú arbeiðsmegin ikki strekkir til, og vit eru noydd at innflyta arbeiðsmegi. Herumframt hevur eitt ov høgt skattatrýst eisini nógvar aðrar negativar fylgjur.

Tað er eisini áhugavert í hesum sambandi, at um vit taka samlaðu skattainntøkuna hjá landi og kommunum, er hon bert umleið 36% av samlaðu lønarútgjaldingunum. Spurningur er tí, hví halda øll seg so gjalda alt ov nógv í skatti? Marginalskatturin ger sín part, og her er tað ójavni skatturin millum tey, ið forvinna nakrar fáar túsund krónur og so tey, ið hava eina miðalinntøku, ið gevur skeivu myndina av samlaða skattatrýstinum.

Hetta førir so til spurningin, um tað er rætt, at tey ið forvinna t.d. kr. 20.000 ongan skatt skulu gjalda, og tey ið forvinna kr. 60.000 bert skulu gjalda 20% í skatti, meðan tey í hava eina miðalinntøku uppá kr. 200.000 skulu gjalda 41% í skatti? Og fara vit uppá kr. 300.000 skulu 47% gjaldast í skatti! Havast skal eisini í huga, at tað eru familjurnar, ið eru noyddar at hava eina rímiliga inntøku, sum gjalda henda hægra skattin, meðan tað fyri ein stóran part eru fólk við ongum skyldum, ið sleppa við tí lægra skattinum.

Hetta eru nakrar av negativu fylgjunum av einari avskeplaðari progresivari skattasskipan, har skattjaldarin ongantíð veit, hvussu nógvan skatt hann skal gjalda næstu ferð hann fær løn. Hevði tað ikki verið einklari, um øll skuldu goldið t.d. 35% í skatti? - Hjá mær er ongin ivi.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

## VIÐMERKINGAR

# Álit - heldur enn eftirlit ???

**Ásmundur Guðjónsson**



Fólkaskúlin var til viðgerðar í SVF-sendingini Fokus týskvøldið. Sera viðkomandi og tiltrongt tiltak landstýriskvinnan er farin undir. Í kjakinum var millum annað komið inn á, hvussu menningin av frálæruni skuldi skipast. Niðurstøðan hjá Annlis var púra greið, at menningin skuldi byggjast á "álit - heldur enn eftirlit", sum hon tók til. Álit skal verða garanturin fyri menningini av fólkaskúlanum framyvir og eftirlit er nakað, vit bara seta eina parentes um.

Haldi, at Annlis hevur fingið hesi hugtøk nakað skeivt í hálsin. Eftir hennara fatan er ein andsøgn millum tað, at partarnir sum varða av skúlanum hava álit á hvørjum øðrum, og tað, at eitt ávíst eftirlit er við frálæruni í skúlanum. Eftir mínum tykki nýtist als ongin andsøgn at verða millum álit og eftirlit, heldur tvørtur í móti. Eitt eftirlit er eitt sera væl hóskandi amboð og alneyðugt harafturat til tess at tryggja, at gott álit er partanna millum og ikki minst, tá vit tosa um menning av frálæruni!

Havi í nógv ár arbeitt við eftirliti við fiskaframleiðslu á sjógvi og á landi. Havi mett um fram-leiðsluviðurskiftini á skipum og á virkjum upp móti reglunum og givið leiðsluni frágreiðing um tey staðfestu frávikini, sum so leiðslan skal tryggja, at tað verður rættað uppá.

Tað eru sjálvandi bæði positivar og negativar upplivingar fyri báðar partarnar í einum slíkum eftirlitið, ongin ivi um tað. Men mínar royndir eru, at har álit er millum partarnar, er eitt skikkað eftirlit til stórt gagn fyri tann, sum er undir eftirliti. Tað er nú einaferð soleiðis, at virkisleiðslur av góðum grundum ikki síggja tað sama sum tey, sum bert vitja av og á og harafturat hava venjing í at observera. Uttan at taka munnin ov fullan so eri eg sannførdur um, at tað eftirlit, sum skip og virkir eru undirløgd frá myndugleikans síðu, eigur týðandi leiklut í at støði í fiskaframleiðsluni er í støðugari betring.

Virkini eru undirløgd onnur eftirlit eisini, til dømis eru keyparar av vørunum týðum á eftirlitsvitjan og meta um støði og vørur. Omaná hesi eftirlit eru fleiri virkir farin í holt við at fáa stítt góðkukervið mett og sertifiserað av triðja parti, eitt nú eftir ISO-standardunum.

Umframt at virka í eftirliti, havi eg í mínum arbeiði eisini roynt at siti hinumegin borðið, at verða tann, sum verður mettur. Hetta av umboðum fyri útlendskar myndugleikar (ES). Havi tí eisini verið í somu støðu sum tey, eg havi havt eftirlit við. Eg skal viðganga, at tað er hart at fáa allar teir naknu sannleikarnar at vita, og tað skal vendast og tyggjast væl, áðrenn alt hetta kann svølgjast. Kan heldur ikki burturforklára at ein fær eina kenslu av at verða settur upp á pláss.

Ein slík meting verður gjørd av skikkaðum fólki og sæð positivt er tað ein stór avbjóðing at samstarva við felagar á henda hátt. Tey hava staðfest tað, vit áttu at havt staðfest og tað fakliga kjakið verður so um, hvørjar rættandi atgerðir eru hóskandi og sjálvandi fer ein at endurskoða seg sjálvan og reglur arbeitt og mett verður eftir.

Í okkara høvuðsvinnu er tað vorðið vanligt við regluligum metingum av ymiskum slagi og alla tiðina arbeiða við at gjøgnumføra tær betringar, sum eru neyðugar og ynskiligar fyri ikki at detta niður í millum. Hetta meira og minni konstanta eftirlitstrýst á virksileiðslur hevur eftirhondini gjørt, at eftirlitsvirksemi nú er vorðið ein nátúrligur partur í stýringini av virkjunum.

Aðrastaðni í samfelagnum - líka frá minsta handlinum í SMS til Atlantsflog - er tað eisini púra vanligt at leiðslur hava neyvt eftirlit við og innlit í tað, sum fyriferst í fyritøkuni. Uttan henda stýringsmøguleika hevði fyritøkan skjótt verið á fallandi fóti.

Men aftur til fólkaskúlan… Mínar royndir við fimm børnum í fólkaskúlanum er, at tað er stórur munur millum skúlar og eisini er stórur munur í frálæruni og trivnaðinum millum flokkarnar í sama skúla. Orsøkirnar til munirnar kunnu verða margfaldar og skal eg ikki koma nærri inn á tað her. Men eg ivist onga løtu í, at ein máti at koma mununum til lívs og at menna støði í frálæruni og trivnaðinum alla tíðina, er at skipa fyri einum skikkaðum eftirliti við tí, sum fyriferst innan skúlans gátt.

Fáa vit gjørt tey mál Annlis tosaði um ítøkilig og málbar og fylgd upp við ítøkiligum málsetningum, politikkum, reglum og mannagongdum fyri frálæruna og øðrum viðurskiftum í skúlanum hava vit eitt gott grundarlag at byggja víðari á.

Næsta stigið verður at fáa snikkað til eitt neyvt og skikkað eftirlit, sum við at seta veruleikan í frálæruni og trivnaðinum upp í móti teimum niðurskrivaðu málunum, er ført fyri at meta um og vísa á, á hvørjum økjum og hvussu betringar kunnu fremjast í skúlunum.

Kann verða, at hetta tiltak ikki verður tikið væl í móti av einstøkum lærarum, tí teir nú skulu venja seg við, at hugt verður yvir aksalrnar á teimum. Men tá henda barnasjúkan er lekt, standa allir møguleikar opnir til nøkur lop á menningarleiðini og fólkaskúlin kemur inn í eina positiva ringrás.

Eftirlitið er eitt sterkt amboð vit foreldur, lærarar, skúlaleiðslur og myndugleikar hava í hondini, so tað ræður bara um at brúka tað!

Jú, jú álit skal til, men tað verður eftirlitið, sum framleiðir tað.

# Ísrael og »stolna« land teirra

**Ísraelsfelagið Vinir Ísraels í Føroyum Ísraelsmissiónin**

Skipað varð fyri friðarfundi á Vaglinum í Havn, leygardagin 1. februar 2003.

Í einari av talunum varð m.a. sagt, at "Ísrael má gevast við at byggja sína tilveru á stolið land". Júst hetta brotið varð endurgivið í Útvarpi Føroya.

Vit skulu við hesum boða frá, at vit harmast stórliga og mótmæla at slíkur pástandur, uttan nakað grundarlag, verður slongdur út í Føroyum.

Neyvan nakað land í heiminum hevur so gamlan og skjalfestan rætt til land sítt sum Ísrael.

Longu fyri uml. 4000 árum síðan lovaði Gud í Himli ættarfaðiri ísraelsmanna, Ábrahami, landið í æviga ogn. Hetta lyftið finst skrivliga ídag, og umfatar munandi størri landaøki, enn lítli snøkilin sum Ísrael eigur ídag.

Seinni hevur ST eisini staðfest landaøki til Ísrael.

Sokallaðu "hersettu" økini, sum umfata Judea, Samaria og Golan, vann Ísrael, tá landið varð álopið í juni 1967.

Á vári í 1967 øktist spenningurin í Miðeystri og grannar Ísraels vóru sera naskir hernaðarliga, so naskir, at gitna 6-daga kríggið, á trimum hermótum, gjørdist veruleiki.

Øll vita, at tá ið tú loypir á, so eru vanliga tveir møguleikar: antin vinnur tú ella tapur tú.

Um tú vinnur, so er tað tú sum setur markið. Um tú tapur, so er tað hin sum setur markið.

Sum kunnugt so vann Ísrael 6-daga kríggið. Gomlu mørkini móti Jordan og Sýria vóru vónleys at verja og tí setti Ísrael núgaldandi mørk.

Aftur í oktober 1973 varð Ísrael álopið á trimum hermótum samstundis, men megnaði at verja seg. Tá vóru ongar broytingar gjørdar í teimum marknaásetingunum, sum Ísrael varð noytt seta í 1967.

Loyndarmálið við sigrunum Ísraels er, at Harrin Gud í Himli hevur vart teir higartil, sum skrivað er í Sálmi 121,4.

Ísrael hevur onki land stolið, men teir hava sín fulla rætt til land sítt. Hjá teimum snýr tað seg um lív ella deyð; teir ynskja ikki ófrið ella kríggj við nakran; kortini vísur stórur partur av heiminum teimum støðugt meira og meira illvild.

Eisini her í Føroyum merkist illviljin týðiliga, tá vit hoyra slíkar útsagnir, sum friðarfundurin kom við.

Vit ynskja og biðja eftir friði millum lond og millum fólkasløg, Sálmur 122,6-9.

# Kommunan og Vallalíð

**Jógvan Arge**
*Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*



Á seinasta býráðafundi í Havn staðfesti meirilutin avgerðina hjá samgonguni og sosialu nevnd at lækka bygningin hjá heiminum fyri minnisveik í Vallalíð við hálvumøðrum metri. Avgerðin varð tikin við átta atkvøðum fyri.

Drúgvur orðadráttur var á fundinum millum býráðsformannin og umboð fyri minnilutan. Minnilutin mælti til, at býráðið harmaðist um ta ófullfíggjaðu viðgerð, sum málið hevur fingið, og samtykti, at málið varð tikið til nýggja viðgerð.

Hetta uppskot minni-lutans fekk tríggjar atkvøður fyri og sjey ímóti og var sostatt fallið.

Sum kunnugt avgjørdi meirilutin í býráðnum at lækka byggingina við Vallalíð, eftir at grannar høvdu gjørt vart við, at býráðið hevði ikki rætt til at byggja, soleiðis sum tað gjørdi.

Undir viðgerðini førdi undirritaði m.a. hetta fram:

"Hendan loysnin er ongin loysn. Hetta er eitt miksmaks, sum rýkur langan veg av ringari samvitsku hjá meirilutanum, sum fyri 800.000 krónur eyka av skattaborgarans pengum roynir at bjarga sær burtur úr einum ófyrigeviligum kommunalum mistaki.

Í fyrsta lagi er at siga, at borgarstjórin hevur ásannað, at økið, sum bygt verður í, í 1975 varð avlagt sum fríøki, og við hesi vitan hava fólk sett seg niður í umráðnum.

Hvat ger kommunan?

Hon brýtur seg inn á hetta fríøki, grevur og grópar og fyllir upp við túsundtals tonsum av mold og gróti at seta ein høgan bygning. Hetta er eitt stórt álitisbrot mótvegis borgarunum.

Í øðrum lagi hevur byggiætlanin ikki verið til hoyringar hjá grannunum soleiðis, sum hon skal, tá talan er um at broyta eina útstykkingarætlan.

Í triðja lagi er at siga, at bygningurin, sum skuldi byggjast til minnisveik, skuldi liggja væl í lendinum. Tað stendur svart upp á hvítt í tilfarinum frá nevndini, sum dømdi tey innkomnu uppskotini til hetta heimið.

Tað ger hann ikki eftir teirri fyrru byggiætlanini, sum varð steðgað, og tað ger hann heldur ikki eftir teirri núverandi byggiætlanini, sum meirilutin í býráðnum hevur lagt til rættis og sett arbeiðið í gongd aftur eftir.

Broytingarnar eru framvegis langt uttan fyri tað, sum sømir seg kommununi at gera, og tað er tað avgerandi í málinum.

Tit gera tykkum inn á borgarnar og teirra trivnað, og hetta er skaðiligt virksemi fyri bæði fólkið, sum her býr, og fyri Tórshavnar Kommunu.

Býráðið alt, sum tað er, hevur positivan hugburð til byggingina av heiminum til minnisveik. Vit í minnilutanum vilja fegin, at hildið verður fram á hesi leið til tess at nøkta tann tørv, sum okkara meðborgarar hava.

Men tað fellir okkum sera illa, at hóast tey grovu mistøk, sum her eru gjørd, fremur kommunan eina bygging, sum fer langt út um teir karmar, sum kommunan hevur at virka í.

Tí er mítt uppskot til samtykt í kvøld hetta:

"Býráðið harmast um ta ófullfíggjaðu viðgerð, sum hevur verið av málinum um bygging av heimi til minnisveik við Vallalíð, og samtykkir, at málið verður tikið til nýggja viðgerð sambært teimum reglum, samtyktum og upprunaætlanum, sum eru galdandi fyri tað avlagda grøna økið við Vallalíð."

Hetta uppskot fekk bert tríggjar atkvøður fyri og sjey ímóti.